# Vágoyggin stóra framtíð fyri sær

**Við flogvølli og undirsjóvartunli hevur Vágoyggin eina stóra framtíð fyri sær, og tað ræður um hjá vágafólki at troyta møguleikarnar heldur formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal**

VÁGATUNNILIN
*Jan Müller*

*Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins heldur, at tað nú hevur skund at fáa gjørt tunnilin til Norðoyggjar*
*Mynd Jens K Vang*

– Hetta er ein sera stór løta. Tað er kanska tað einasta sambandið, sum vit eru samd um í føroyskum politikki, og sum øll taka undir við sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, nú fast samband er millum Vágaoynna og Streymoynna.

Hann heldur hetta vera eina sera stóra avbjóðing fyri Vágoynna, sum nú verður knýtt uppí meginøkið. Fyri Vágoynna hevur tað so eisini týdning, at tunnilin verður ein slúsa inn í oynna og ikki bara ein slúsa út. Tvs. at kommunurnar og fólkið í oynni mugu eisini strongja á at fáa útbúgvingarmøguleikar fyri at fáa ment Vágoynna. So Vágoyggin hevur eina stóra framtíð fyri sær við flogvølli og tunli sigur hann.

Formaður Tjóðveldisfloksins vísir á, at tað fyri nøkrum árum síðani tóktist veruleikafjart at binda alt landið saman við føstum sambandi, men tað er tað vit skulu miðja eftir. – Um 20 ár er tað kanska ikki ómøguligt at hava samband til Suðuroyar. Men fyrst koma Norðoyggjar og síðani Sandoyggin, Tað hevði verið tann besta framtíðin fyri Føroya land, at vit fingu tað so mikið samanbundið, at tú hevur somu møguleikar, hvar tú enn býr í landinum.

Høgni Hoydal heldur tí, at slíkir tunlar eru ein av fortreytunum fyri at kunna varðveita búsetingarmynsturið. – Tað merkir so eisini, at tey øki, sum verða bundin uppí meginøkið, eisini mugu leggja meira fyri fyri at fáa ment sítt øki, so tunlarnir og sambondini ikki bara ganga einvegis men eisini draga vinnulívið og fólk til oynna.

Høgni Hoydal heldur tí, at Vágatunnilin er ein sera skilagóð íløga. Ein kann kanska harmast um, at tað ikki byrjaði fyrr og at tað steðgaði upp. Vóru vit byrjaðir fyrr, so høvdu vit eisini verið komnir longur aðrastaðni.

Samtykt er at fara undir at gera tunnil til Norðoyggjar eisini. – Vit eiga at fara í gongd har skjótast gjørligt, tí tað er ein íløgar, sum varir fyri allar føroyingar í allari framtíð

# Skerjing av blokki seinkar øðrum tunlun

*Edmund Joensen, fyrrverandi løgmaður heldur Vágatunnilin vera eina skilagóða íløgu fyri allar føroyingar*
*Mynd Jens K Vang*

**– Hevði samgongan ikki skert blokkin við nærum 400 mill. kr., hevði tað gingið nógv skjótari at fingið aðrar undirsjóvartunlar kring landið heldur formaðurin í tingbólki Sambandsfloksins, Edmund Joensen**

VÁGATUNNILIN
*Jan Müller*

– Hetta er ein stórur dagur fyri allar føroyingar og serliga fyri vágafólk, tí nú hava vit samband við miðføroyar. Hetta kemur at broyta samfelagsmynsturið nakað so nógv, sum vit ikki kunnu hugsa okkum sigur Edmund Joensen, fyrrverandi løgmaður og formaður í tingbólki Sambandsfloksins.

Hann vísir á, at føroyingar í dag hava Vágarnar sum úthurðina út í heim. – Skulu vit ferðast og ferðast skjótt so er tað loftvegis. Nú koma nógvir føroyingar at hava minni enn ein tíma til flogvøllin og tveir tímar út í heim. So meðan flestu føroyingar hava fingið eitt samband vestur í Vágar, so hava teir samtíðis fingið eitt nógv stytri samband út í heim.

Edmund Joensen heldur annars, at hetta kennist gott og stórt og vísir á, at tað er so stutt síðani, at tøknin megnaði at gera undirsjóvartunlar. Fyri 20 árum síðani var tað fáur, sum hugsaði, at hetta bar til. Nú er tað gingið so rúkandi skjótt, og hevði kreppan ikki tikið seg upp fyrst í 90-unum, so hevði hesin tunnilin verið veruleiki fyri fleiri árum síðani. Men kanska er tað ein fyrimunur, at tað varð steðgað eitt sindur á, tí vit hava harvið fingið eitt meira fullfíggjað projekt, sum kanska eisini er bæði bíligari og tryggari og betri.

Edmund Joensen heldur tí, at hetta er ein sera skilagóð íløga. Tað heldur hann eisini um ætlanina at gera tunnil til Norðoyggjar og í grundini er tað heldur einki, sum forðar fyri at gera tunlar til tær oyggjar, sum hava eitt fólkagrundarlag til tað. Her hugsar hann um sambandið til Suðuroyum umvegis Sandoynna. Hetta er meira ein spurningur um pengar enn um tøkni.

– Høvdu vit ikki skert ríkisstuðulin, so hevði verið rættiliga stutt tíð til vit høvdu bæði tunnil til Norðoyggjar og til Sandoynna og kanska eisini til Suðuroyar. Tunnilin til Norðoyggjar kostar umleið 400 mill. kr., og tað er júst tað, sum henda samgongan hevur skert blokkin við. So skerjingin av blokkinum fer givið at seinka tunnilstilgongdini metir Edmund Joensen.

# Skilagóð íløga

VÁGATUNNILIN
*Jan Müller*

Stjórin í Føroya Sparikassa var eisini millum teir mongu gestirnar, ið vóru til steðar, tá sprongt varð ígjøgnum í Vágatunlinum. Bjarni Olsen heldur hetta vera eina radikala broyting, eina skilagóða íløgu, sum fer at hava stóran týdning fyri samfelagið. Búskaparliga er hon er á góðari leið men haraftrat kemur, at hetta er ein rættiliga serstøk íløga, tí hon hevur ringt við at tjena seg inn aftur á vanligan hátt. Inntøkurnar liggja øðrvísi enn um talan var um eitt vanligt privatøkonomiskt projekt. Tær liggja í teimum fyrimunum, sum hvør einstakur hevur.

Bjarni Olsen heldur tað eisini vera skilagott at gera ein tunnil til Norðoyggjar. – Vit vita, at nógvur trafikkur er inn í Eysturoynna, og tað kann tí væl vera, at tað er grundarlag fyri einum yvirskoti í einum slíkum roknistykki eisini.



# Eitt vælaarbeiði

*Samgonguleiðari og andstøðuleiðari í sátt og semju. Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins og Anfinn Kallsberg, løgmaður eru samdir um, at Vágatunnilin er ein skilagóð íløga*
*Mynd Jens K Vang*

**-Talan er um eitt vælaarbeiði, sum fólkini, ið hava staðið fyri Vágatunlinum, hava útint og verða royndirnar frá hesum fyrsta undirsjóvartunlinum av stórum týdningi fyri komandi tunlar av sama slag, her ikki minst tann til Norðoyggjar heldur formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard**

VÁGATUNNILIN
*Jan Müller*

Hann dylur ikki fyri, at hann tøkniliga sað er sera hugtikin av hesum arbeiðinum, at tað hevur gingið so væl, og hvussu væl tað er fráfarið og hvussu snøggur tunnilin er vorðin.

- Eg kann ikki lata vera við at samanbera hetta arbeiðið við arbeiðið uppá tunnilin millum Tvøroyri og Hvalba, har menn spentu seg fastar í bjálkar og boraðu við hond. Nú sær man, hvussu stór tøkniliga menningin hevur verið, nú ein maður situr og stýrir einum borivogni, ið ger arbeiðið.

Formaður Javnaðarfloksins heldur tað eisini vera gott at síggja, at øll fólk, eisini tey, sum vóru í iva, eru sannført um, at íløgan er skilagóð, og at hon letur upp fyri nøkrum møguleikum í samferðslukervinum í Føroyum, har vit hava náttúrligar forðingar við sundum og firðum og fjøllum. – Eg ivist ikki í, at koma vit væl frá hesum, og tað er tað alt, sum bendir á, so eru møguleikar fyri at halda fram við líknandi verkætlanum sum hesum.

Jóannes Eidesgaard ivast tí heldur ikki í, at tunnil um Lorvíksfjørð eisini er eitt skilagott projekt. Alt bendir nevniliga á, at tann tunnilin verður eitt náttúrligt framhald av Vágatunlinum. – Tað er sera umráðandi, at vit tí heysta nakrar royndir av hesum arbeiðinum, bæði hvat íløgu og rakstri viðvíkur, hvønn týdning ein slíkur undirsjóvartunnil hevur fyri land og fólk, hvat hann merkir fyri ferðamynsturið osfr. So dagurin í dag hevur heilt vist latið meira upp fyri møguleikanum at gera tunnil til Norðoyggjar heldur tingmaðurin.

Vit spurdu Jóannes Eidesgaard, um tað ikki hevði verið betri at bíðað við einum stórum Suðuroyarskipi og heldur útbygt sambandið við tunlum. Til tað sigur hann, at vit mugu vera so mikið realistisk og innsíggja, at fast samband til Suðuroyar neyvan verður veruleiki í okkara tíð. Tí er nýggja suðuroyarskipið avgjørt neyðugt.

Hann heldur tað tó ikki vera veruleikafjart at hugsa um fast samband til Sandoynna, og tað letur so eisini upp fyri møguleikanum, at Suðuroyggin kann fáa eitt annað ferðamynstur enn tað hon hevur, nevniliga við føstum sambandi um Skopunarfjørð.

Alt í alt heldur formaður Javnaðarfloksins, at íløgan í Vágatunnilin letur upp fyri nøkrum møguleikum, sum vit kanska ikki hava hugsað um, tá vit hava umrætt samferðslukervið í Føroyum.

# Eingin lóggáva er um tóm hús

**Nýtt málsøki, sum skal taka sær av íbúðarmálum, er júst sett á stovn, sigur løgmaður. Eingin lóggáva er á økinum, og tí kann einki gerast við tómu húsini sum er**

ÍBÚÐARMÁL
*Edvard Joensen*

Tað er øgiliga ringt at gera nakað við málið um tey tómu húsini, sum standa kring landið, tí eingin lóggáva er, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, í viðmerking til tað, borgarstjórin í Sørvági segði í Sosialinum hósdagin.

Løgmaður ásannar, at tað er ein trupulleiki við øllum tómu húsunum sum standa kring landið, samstundis sum stórar og dýrar útstykkingar verða gjørdar nógvastaðni. Verandi støða kann ikki halda fram, sigur hann.

– Vit kunnu ikki hava øll hesi spøkilsishúsini standandi kring landið, sigur løgmaður. Men hetta er eitt sera trupult mál, har ognarrætturin eisini skal takst við.

Hetta málið er ikki nýtt sum so. Tí longu í 1997 gjørdi Oyndarfjarðar Kommuna av at leggja gjald á tómu húsini í bygdini. Men tað varð steðgað við skrivið frá Løgmansskrivstovuni.

Grundin til, at oyndfirðingar løgdu gjald á, var tann, at í grannakommuniuni, Elduvík, høvdu tey ætlanir um at leggja skatt á hesi húsini. Har fingu tey at vita, at tað var ikki loyvt, og tí royndu oyndfirðingar seg við avgjaldi ístaðin. Tað gekk so heldur ikki.

Anfinn Kallsberg , løgmaður, sigur, at hann kennir ikki hesi bæði málini, sum munnu hava verið fyri hansara tíð. Hann gjørdist løgmaður í 1998, og kann tí ikki gera viðmerkingar til tey.